## Nýggi barnagarðurin á Traðagøtu fingið leiðara

Klaksvíkar kommuna hevur sett Hedvig Johansdóttir sum dagstovnaleiðara í Barnagarðinum á Traðagøtu. Hedvig Johansdóttir, sum er 32 ára gomul, er útbúgvin námsfrøðingur frá Ballerup Seminar í Danmark, har hon rók prógv í 2001. Síðani hevur hon millum annað arbeitt á einari kreppumiðstøð fyri ung á Nørrebro í Keypmannahavn, og síðani í fjør hevur hon starvast á frítíðarskúlanum Sornhúsinum í Klaksvík. Barnagarðurin á Traðagøtu letur ætlandi upp um hálvan september. Har er pláss fyri 24 vøggustovubørnum og 40 barnagarðsbørnum. Ætlandi verða 16 starvsfólk knýtt at nýggja barnagarðinum umframt leiðaran, og hesi verða sett í starv í løtuni, skrivar klaksvik.fo.

## 50.000 krónur til Asia

Reyði Krossur Føroya hevur latið 50.000 krónur til neyðhjálpararbeiði í suðurasia, har 800 fólk eru druknað av nógva regninum, sum nú hevur hildið á í fleiri vikur. Afganistan, Bangladesh, India og Pakistan eru harðast rakt, og góðar tríggjar milliónir fólk mugu hava latið seg merkt av nógva regninum. Hjálparleiðarin á staðnum, Nina Nobel, sigur, at nógva vatnið hevur ført til ógvsligastu vatnflóðina í nýggjari tíð.

# Ung áhugaði í ólógligum evnum



*- Tað vóru serliga ungir dreingir, sum vildu hava stórar vøddar skjótast gjørligt, sum vildu vita ymiskt um eitt nú steroidir, sigur Jana E. Thomsen, sum hevur 21 ára royndir sum fitnessinstruktørur*

**Fitnessinstuktørur, við 21 ára royndum innan økið, váttar, at áhugin í Føroyum fyri ólógligum vøddafremjandi evnum hevur verið stórur**

EVNISMISNÝTSLA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Jana E. Thomsen, fitnessinstruktørur, dylir ikki yvir, at hon í sínum yrki javnan hevur varnast áhuga millum føroyingar fyri ólógligum vøddafremjandi evnum. Í 21 ár rak hon heilsumiðstøðina Fragd og Fimi í Havn. Har fekk hon javnan fyrispurningar um tey ymisku evnini, sum fáa vøddarnar at vaksa skjótari.

### Gerast bundin

– Tað vóru oftast ungir dreingir, sum forvitnaðust eftir steroidum og líknandi evnum. Orsøkin var typiskt, at teir høvdu onkran stóran body-buildara sum fyrimynd, og sum teir fegnir vildu koma at líkjast. Og tað skuldi helst ganga skjótt fyri seg, sigur Jana Thomsen.

Meiningin við hesum evnunum er nevniliga, at tú kanst byggja vøddarnar upp við tí rúkandi ferð. Men tað er eisini trupulleikin, tí so skjótt tú gevst aftur, smokkar kroppurin mest sum saman.

Ert tú fyrst byrjaður at brúka tey, er tað tískil sera stórur vandi fyri at gerast bundin av teimum, greiðir Jana frá.

### Gráøki

Sambært landsapotekaranum hoyra hesi summi av hesum evnum heima í einum gráøki, tá tað ræður um eyðmerking av heilivági. Men so leingi hesi evni ikki eru skrásett herheima sum heilivágur, eru allar orsøkir til at vera á varðhaldi, tí tá kanst tú ikki vera vís í, hvat tey innihalda.

Undir øllum umstøðum, er tað framvegis ólógligt hjá einstaklingum at innflyta heilivág. Er fólk í iva, so tilskilar lógin týðiliga nær talan er um heilivág

## FAKTA

**Hvat er heilivágur?**
**Hvør hevur loyvi at innflyta heilivág?**

Løgtingslóg nr. 104 frá 05.09.1988 um apoteksverkið og heilivág

**Heilivágøkið:**
§ 25. Við heilivág er at skilja vøra, sum ætlað er til at geva fólki ella dýrum til at fyribyrgja, gera av, linna, viðgera ella grøða sjúku, sjúkueyðkenni og pínu, ella til at ávirka likamsvirki.

**Almennar reglur um heilivág:**
§ 29. Bert apoteksverkið hevur loyvi til at framleiða, flyta inn, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág, um so er, at einki annað er ásett í hesi lóg ella av reglum ásettum við heimild í lógini.